

## ES bannar kópaskinnum

ES-nevndin fer á fundi í morgin at umrøða eitt uppskot um at banna øllum handli við úrdráttum úr kópi. Herumframt skal bannið umfata flutning við kópaúrdráttum. Ætlanin er tó ikki, at bannið skal umfata úrdráttur úr kópi, sum upprunafólk hava veitt. Aftenposten skrivar, at tað er minni enn so vist, at uppskotið verður samtykt, tí at fleiri av limalondunum eru ímóti tí. Millum londini, sum verða rakt av møguligum banni, eru Noreg og Kanada.

# Kundi fleygað lunda av altanini

**Skúvoyingar hava ikki fleygað nógvan lunda í summar, tí ættin hevur ikki verið til vildar, men lundin er væl fyri í ár**

FUGLUR

*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*



-Nú erin dagin fleyg lundin í ring inn yvir bygdina, og tað havi eg ikki sæð í mong ár. Í stovuvindeyganum sá eg lunda flúgva tætt ímóti húsunum. Eg fór útum at hyggja, og hevði eg havt eina toliliga langa stong, hevði eg kunnað fleygað lunda av altanini.

Tað sigur skúvoyingurin Harry Jensen.

Skúvoyingar hava ikki fleygað nógv í summar. Tað kemst partvís av, at ættin hevur ikki verið til vildar, men tað er eingin ivi um, at tað er meiri av lunda og lomviga ár enn seinastu nógvu árini. Niðan fyri bygdina plagdi at vera gott lundaland, og fyrr var vanligt, at lundi sat á brimgarðinum. Tað hava skúvoyingar ikki sæð í fleiri ár, men nú er lundin komin aftur á brimgarðin bat sita, og sambært teimum gomlu skúvoyingunum er tað tekin um, at lundin hevur tað gott.

Harry Jensen sigur, at tað sæst eisini týðiliga í bjørgunum, at tað er meiri lundi í ár.

-Í gjár vóru vit á fjalli, og tað sást týðiliga, at har hevur verið nógv meiri lundi í ár enn í mong ár.

Í frágreiðingini, sum Fiskirannsóknarstovan kunngjørdi í síðstu viku, stendur, at tað hevur ongantíð verið so nógv nebbasild á landgrunninum síðani 1974 sum í ár. Harry Jensen sigur, at skúvoyingar hava sæð nógvan sildbera í summar, og at teir hava eisini sæð lomviga við sild.

-Eg havi hoyrt, at lundin ber meiri sild, enn pisurnar klára at eta, sigur Harry Jensen.

*-Sildberin ber ordiliga í ár, og vit síggja eisini lomviga við sild, sigur Harry Jensen í Skúvoy*



*(Mynd: Suðurrás)*

## Sjáldsamur fiskur á uppboðssølu

Tey, sum keyptu fisk á uppboðssøluni í Vági í gjár, høvdu eitt rættiliga sjáldsamt tilboð. Ein bátur úr Vági hevði avreitt ein rættiliga sjáldsaman fisk. Suðuroyarportalurin skrivar, at okkurt bendir á, at taloan var um ein bramafisk, hóast hesin fiskurin ikki hevði gulligar uggafjaðrar, sum hesir fiskar annars hana sambært bókini "Fiskar í Føroyum".



*Meinhard Jacobsen tingast við miðvingar og fuglfirðingar um fiskavirkini har*

# Fiskavirking fingið ætlanarskriv um virkið í Miðvági

**Fiskavirking tingast við áhugað um virkini í Fuglafirði og Miðvági, men virkið á Tvøroyri hevur lítlan áhuga**

FISKIVINNA

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Síðani tann 6. juni hava miðvingar bíðað eftir, hvussu verður við flakavirkinum í bygdini, og okkurt bendir á, at dyrnar kanska ikki verða stongdar so leingi afturat. Meinhard Jacobsen, stjóri, sigur, at felagið hevur fingið eitt ætlanarskriv frá fólki, sum áhuga í at leiga virkið í Miðvági.

Tað hevur ljóðað, at tað eru fleiri uppskot um, hvat fiskavirkið í Miðvági kann brúkast til. Meinhard Jacobsen sigur, at tað er ein treyt fyri einum møguligum leigumáli, at bygningurin skal brúkast til annað virksemi enn vanligt fiskaarbeiði.

Í Fuglafirði er Fiskavirking í samráðingum við tveir partar, sum hava hug at yvirtaka virksemið har. Støðan í Fuglafirði er eitt sindur ørvísið enn í Miðvági, tí Fiskavirking eigur ikki virkið í Fuglafirði, men bara útgerðina inni á virkinum. Tað er Havsbrún, sum eigur bygningin, sum Fiskavirking so leigar.

Meinhard Jacobsen sigur, at Fiskavirking ætlar at lata aðrar yvirtaka leigumálið við Havsbrún og útgerðina inni á virkinum. Hann sigur, at tað eru lokalar kreftir í Fuglafirði, sum hava hug at yvirtaks virksemið.

Meðan Fiskavirking tingast við miðvingar og fuglfirðingar um virkini har, eru ongar tingingar um virkið á Tvøroyri.

-Suðuroyggin liggur í dvala, sigur Meinhard Jacobsen. Hann vísir á, at teir flestu trolararnir í oynni liggja við bryggju, og at tí er lítið arbeiði í oynni. Tí eru heldur ongar tingingar um virkið á Tvøroyri í løtuni, sigur hann.